NØVN Í VIKUNI

Árni Ellefsen statsgóðkendur grannskoðari

Árni Ellefsen, sonur Henny og Paula Ellefsen, hevur í Keypmannahavn tikið prógv sum statsgóðkendur grannskoðari. Vegurin er langur fram til hetta heitið, sum er tað hægsta innan grannskoðaravirksemi. Eftir lokið HD prógv tók Árni Ellefsen, sum í næsta mánaði fyllir 36 ár, prógv sum cand. merc. aud í 1997. Hann arbeiddi á virkinum hjá pápanum frá 1996 til í fjør, tá hann fór niður aftur. Hann hevur starvast sum grannskoðari hjá C. Jespersen KPMG í Keypmannahavn, meðan hann hevur fyrireikað seg til stóru prótøkuna, sum statsgóðkendur grannskoðari nú seinasta árið

Árni er giftur Ann Danielsen, og tey eiga tvær døtur. Ann útbúgvir seg víðari sum lækni niðri.

Andrass Róin 40



Leygardagin fylti stjórin á Føroya Tele, Andrass Róin 40 ár. Andras er sonur Jógvan Róin, yvirlækna og Lilly, sum doyði fyri nøkrum árum síðan.

Nógv er hent á teleøkinum síðan Andrass Róin varð heintaður heim úr stóra heimi at stjórna Telefonverkinum miðskeiðis í nítiárunum. Ein øgilig menning er hend innan teleøkið seinastu 10 árini og telefonverkið skuldi broytast. Niðri á Jydsk Telefon, seinni Tele Danmark varð Andras Róin byrjaður karrieru sína. Frammanundan hevði hann lokið embætisprógv sum cand. oceon. kandidatur í búskapi.

Danir høvdu sæð, at evnir vóru í hesum fryntliga og friðaliga manni og hann fekk skjótt fótin fyri seg. Hann stóð fyri samskiftinum millum arbeiðsplássið og onnur telefonfeløg kring heimin og hann ferðaðist nógv. Hann skuldi júst taka við nýggjum starvi í Bruxelles, tá boð vóru eftir honum í Føroyum.

Ongin ivi er um, at Andrass hevur dugað at stýrt Telefonverkinum inn í nýggju samskiftistíðina. Tað fyrsta hann gjørdi var at broyta navnið, so tað klingaði saman við telefeløgum í útlandinum. Føroya Tele er enn í stórari menning. Um stutta tíð verður Føroya Tele umskipað til eitt alment partafelag, verður einskilt, sum tað eitur á nýtíðar føroyskum. Kapping er eisini komin á teleøkinum og tað er Andrass Róin, sum skal syrgja fyri karmunum í hesi fríu kapping. Kappingarneytarnir nýta netið hjá Føroya Tele. Andrass Róin hevur visiónirnar og seinasta tíðin hevur sýnt, at Føroya Tele er við í kappingini. Tað gerst bíligari og bíligari at tosa í telefon og ikki bara til tey, lond, har føroyingar ongantíð ringja til. Nú ber til at slatra drúgva tíð um kvøldarnar fyri tað sama sum ein minuttur kostaði fyrr eitt nú til Danmarkar.

Vinir siga um Andrass, at hann er eitt sindur forkelaður. Hann er yngstur av fimm syskjum. Hann er ógvuliga arbeiðssamur, hann larmar ikki nógv og ger ikki nógv burtur úr sær sjálvum. Hann hevur ein veikleika fyri spølum, serliga kortspølum.. Hann eigur tríggjar døtur, ein fosturson.og er ein góður pápi. Og unnustan eitur Kristina. Honum dámar væl fótbólt og er onkuntíð á vøllinum í frítíðini. Og so hevur hann ein veikleika fyri hundum, sum hann heldur nógv av. Hann pástendur, at hann einaferð hevur átt heimsins klókasta hund. Og hann er bilfreak. Honum dámar væl skjótar bilar við vibratiónum undir hjelminum og allarbest er, tá eitt sindur av brendum gummiroyki hongur uppi í bilinum.

Skála Ítróttarfelag takkar sponsorum og viðhaldsfólki, fyri dyggan stuðul í fama kappingarári. Øllum verður ynskt eini gleðilig jól og eitt av Harranun singað nýttár

Mikudagin kemur hann aftur

Tá jólatræið í ár varð tendrað, kom jólamaðurin og tendraði træið, og tey sum vóru á Vaglinum sóu, at hann hevði 10 fittar vættrar at hjálpa sær. Hetta var eitt sindur tíðliga at fara heimanífrá, jólamenn hava nógv at gera uppundir jól, og ikki allar gávurnar vóru lidnar tá, so hann skundaði sær aftur til hulduheyggin, har hann býr.

Vættrarnir hava ferðast um alt landið síðani tá, og vit hava fylgt nøkrum av teimum í barnaútvarpinum, og nú hava teir næstan verið allastaðni í Føroyum. Jólamaðurin er um at vera ferðabúgvin, gávurnar eru næstan allar lidnar, og vættrar pakka og pakka gávur, so hann sleppur avstað áðrenn jólaaftan.

Jólamaðurin í Havn hevur sent boð eftir jólaskipinum og sagt, at teir skulu koma mikudagin, tí hann ætlar at koma í Vágsbotn mikudagin kl. 17. Tað er nakað seint og myrkt tá, men børn í Havn eru í skúla og í barnagarði, so hann bíðar til foreldrini koma eftir teimum, so tey kunnu koma oman og taka ímóti honum saman við jólamonnunum, ið búgva í Húsareyni og Kirkjubøreyni.

Sum altíð gleða teir seg at koma til Havnar, har eru so nógv børn, og so hevði hin jólamaðurin sagt, at býurin er vakrari í ár enn nakrantíð. Tað hildu teir eisini seinasta ár, so teir trúgva honum ikki at tað ber til, men so sigur hann.

Jólahúsið er flutt niðan aftur í Grasagarð, har er eitt sindur friðaligari at sova hjá teimum, so hann svevur helst tungt, hann sum býr har. Fríggjadagin ætla teir seg runt um allan býin, og tað er so langt og teir eru gamlir, so tí hava teir lænt ross, so teir koma á rossabaki oman á Kongabrúnna, áðrenn teir ríða allan vegin útum gamla kirkjugarð.

Men annars so fara teir at ganga runt í býnum allar dagarnir til jóla og heilsa uppá fólk sum eru farin til handils ella bert ein túr oman í býin at hyggja. Tað verður næstan sum á ólavsøku, her eru so nógv, sum eru heima at ferðast og halda jól, eisini tey fara oman í býin at hitta kenningar, fáa sær ein heitan munn og lurta eftir jólatónleikinum, sum verður hvønn dag fram til jólar. Og sjálvandi hava jólamenninir posan fullan av góðgæti.

Handlarnir í bðnum hava eisini leingi glett seg til at teir koma. Teir hava pyntað og fyrireikað seg til, at allir jólagestirnir, stórar og smáar nissur av bygd og úr býi, koma, tí tað er ein serligur hugni og góðvild á jólum. Fólk steðga á og práta, og tey ynskja hvørjum gleðilig jól og eru glað.

Og her úr miðbýnum ynskja vit eisini øllum eini gleðilig jól.

Tøkk

fyri sýnda samkenslu við jarðarferðina hjá góðu mammu, vermammu, ommu og langommu okkara

Bette Justinussen
fødd Eldevig

Tøkk fyri blómur og kransar og peningagávur til Evangeliuhúsið.

Familjunnar vegna
Olaf

Tøkk

Hjartaliga takki eg øllum, sum mintust meg á 80 ára føðingardegnum tann 9. august. Takk til tykkum sum við vitjan, fjarritum, uppringingum, gávum og blómum gjørdu mær dagin so hugnaligan.

Tøkk øll somul

Gleiðilig jól og gott nýggjár

Napoleon Andreasen
Leirvík